LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TIL SØLU
Mazda 323 til sølu sum eykalutir fyri 4-5.000,00 kr.
Tlf. 321591 ella 252711

SUMMARDEKK
Fýra lítið brúkt summardekk á felgum 165/80 R13 til sølu.
Tlf. 447602

YNSKIST
Útstoyt til ein Nissan Sunny árg. 86 ynskist til keyps.
Tlf. 256049

TIL SØLU
Ein Volvo 244 1,9 - 1978 til sølu við eyka hurðum og felgum. Prísur: 2.000,- kr.
Tlf. 452067/255768

FIESTA 1.1
sum kann brúkast til eykalutir, hevur nýggj dekk og lyktir og anhangara, gjørdur burtur úr einum Fiesta, til sølu.
Tlf. 252058

BILUR YNSKIST
Japanari árg. 92-95, ynskist til keyps fyri sámuligan pris.
Tlf. 224910

BILLUTIR
til BMW 318 TDS, árg. 96, til sølu.
Tlf. 218778

OPEL ASCONA 1.6
árg. 87, til sølu. Er best egnaður sum eykalutir. Kostnaður 4.500 kr.
Tlf. 251489

OPEL ASTRA
árg. 95, til sølu fyri 45.000 kr.
Tlf. 423236

TIL SØLU
BMW 320i, árg. 82, koyrt 160.000 km, ið góðum standi, v/ spoilarasetti, bíliga til sølu.
Tlf. 317332/243446

TIL SØLU
Citroén BX Palmares sum eykalutir til sølu.
Tlf. 313819 ella 213819

TIL SØLU
Suzuki GSXR 400R, árg. 89, koyrt 46.000 km í góðum standi og er klár til summarkoyringina. Møguliga kann drakt fylgja við fyri rætta prísin.
Tlf. 220422

TIL SØLU
VW Golf II 1,6 TD árg. 91. Bilurin er í góðum standi, sær gott út og er sera økonomiskur. Við í keypinum eru spildurnýggj píka- og summardekk. Ring og gev eitt boð - bilurin kann sýggjast hjá P/F Esmar Simonsen á Kambsdali.
Tlf. 222324

TIL SØLU
Ein Mitshubitchi Lancer, árg. 87, diesel til sølu. Píkadekk fylgja við, bíliga til sølu. Ringi
Tlf. 421451/253478

BAKSETUR YNSKIST
Baksetur til Nissan Patrol, árg. 90 ynskist til keyps.
310774

TIL SØLU
Reservadeilir til Ford Scorpio til sølu.
251158

TIL SØLU
17" felgur við dekkum, ið passa til Ford, Mercedes & aðrar til sølu fyri 7.500. Nýprísur 14.000. Eru lítið brúktar.
251158

TIL SØLU
Ford Scorpio 2,8i GIHA. Hevur m. a. el-setur og annað, nýsýnaður - til sølu fyri 18.000 kr.
251158

PEUGEOT 106
svartur, árg. 01/98, koyrt 47.000, fløgusspælara, er í sera góðum standi til sølu.
222789

HVØR BJÓÐAR HÆGST
Nissan Bluebird st. car 2,0, árg. 86 til sølu fyri hægst bjóðandi.
221006

TIL SØLU
Skoda, árg. 90, 1,3i til sølu fyri hægst bjóðandi.
321206

AVHEINTINGARTILBOÐ
Toyota Corolla EE80. Árg. 86, aut. gear, koyrt 143.000 km til sølu fyri hægst bjóðandi.
252970

OPEL KADETT 13.S
til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 321444, best e. kl. 18

MAZDA 323
árg. 5/99, koyrt 52.000 km, hevur aircondition, cd-spælara, til sølu fyri uml. 100.000 kr.
Tlf. 318980 - 218980

TIL SØLU
Opel Vectra 1.6S, árg. 12/88 til sølu. Er í góðum standi og sær gott út. Sýnaður 01/03-02. Ring á
313790/220405

FORD ESCORT 16V
árg. 95/97, í sera góðum standi til sølu um hóskandi boð fæst.
312519/212519

TIL SØLU
4 stk. hjólskálir 14" til Ford. 3 stk. dekk á felgum 175/65/14 til Ford Escort, árg. 92 selist hvør sær ella samlað.
254792

FORD SIERRA 2.0
stw, árg. 88 til sølu. Sýnaður 05/2001, er í góðum standi.
255754

MAZDA 323 GTI
sýnaður 11. mán. 2001. Motor 1,6 118 HK. Koyrir væl og er vælhildin til sølu um hóskandi boð fæst.
251439

MAZDA 626
bíliga til sølu. Hevur el. rútar, centrallás, aut. gear. Krevur ábotur. Árg. 87. Ongar nr. plátur.
216121

BUSSUR TIL SØLU
Ein WV Caravelle, árg, 1987, diesel, við 8 sitiplássum til sølu.
214522 og 316088

TIL SØLU
VW Passat frá 1987 bíliga til sølu.
Telefon 243332

TIL SØLU
Nýsýnaður Toyota Corolla árg. 87 til sølu.
Tlf. 210408

DEKK
Fýra summardekk á felgum, 195/15, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 264197

MITSUBISHI COLT
árg. 89, koyrt 107.000 km, í góðum standi. Sýnaður í februar.
Tlf. 333425

Amboð

EFTIRLÝSING
Eg eftirlýsi gearkassakobling til ein tríhjólaðan traktor, nevndur Martin Truck. Vinarliga ringi
361061

COBRA
Brúkt Cobra borimaskina við bensinmotori, borar og brekkarar til sølu fyri 12.000 kr.
315600

Arbeiði

ALT FYRIFALLANDI ARBEIÐI
verður gjørt av tilkomnum handverkara.
Tlf. 310352

TILBOÐ YNSKIST
Tilboð ynskist til innrætting av kjallara skjótast gjørligt.
Tlf. 441276/260276

Barnaansing

ER NAKAR
sum kann ansa eftir lítla Fríða, sum er 21 mðr. gamal? Tíðarskeiðið er frá 1. apríl til og við 31. mai 2002.
Una, tlf. 228618 ella 314724, e. kl. 16

Barnaútgerð

VOGNUR YNSKIST
Odder barnavognur við knekk hondtaki ynskist. Ikki combi.
Tlf. 315758

TVÍBURAVOGNUR
við lyftum ynskist til keyps.
Tlf. 448330 / 218330

VOGNUR TIL SØLU
Vakur kombi vognur/stólur til sølu. Puslitaska hoyrir til. Myrkagrønur við hvítum mynstri.
Tlf. 448330 / 218330

BARNAVOGNUR
Lítið brúktur barnavognur til sølu, Av slagnum „Basson". Litur: grønur. Tilhoyr: lift, madrass og taska - til sølu fyri 3.000 kr. Nýprísur kr. 4.300.
Tlf. 442101

TIL SØLU
Grulvigarður til sølu fyri 400 kr.
256507

Bátaútgerð

TIL SØLU
Danskt bygdur frambygdur dekksbátur frá 76 við/uttan fiskiloyvi selist um hóskandi boð fæst.
Tlf. 423555 ella 288088

BÁTUR YNSKIST
Bátur við fiskiloyvi og útgerð ynskist til keyps.
Telefon 455328

ÚTRÓÐRARBÁTUR
(27-32 fót) ynskist til keyps.
Ring á 457225 ella 225243

YNSKIST
NMT 450 telefon til bát ynskist til keyps.
221866

TIL SØLU
Ein 27 fót Scandia plastbátur til sølu um hóskandi boð fæst. Við ella uttan fiskiloyvi.
Tlf. 265082

TIL SØLU
Motorbátur »Sluppungi« til sølu um hóskandi boð fæst. Við fiskiloyvi 5A.
Tlf. 441897

Bingo

BÁRU-BINGO
Stórt Báru bingo verður í Skálanum mánakvøldið 8. apríl kl. 19.30. Á Báruhjólinum er møguleiki at vinna gávukort upp til 6.000 kr. Vinningur til fulla plátu: Ein konfekteskja Kong Håkon. Hetta er næstseinasta bingo áðrenn summarsteðgin. Eisini spæla vit minibingo og 20. krónuspæl.
Bygdafelagið Báran í Árnafirði

BÁRUBINGO
Heimabingo fæst til keyps á posthúsunum, og í sølubúðum um alt landið. Tú sært beinanvegin um tú hevur vunnið.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 6. apríl kl. 16.00.
Eldrafelagið Borgin

AB-STUÐLAR
skipa fyri góðum bingo í Róðrarneystinum á Argjum tann 4. apríl kl. 19.00. At vinna m.a. tvær stórar baljur fullar av mati. Burturluting. Millumspæl. Eykaspæl. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-stuðlar

VÁGS PENSIONISTAFELAG
hevur bingo í Framtíðini hósdagin 4. apríl kl. 19.00.
Nevndin

GOTT BINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 15. apríl kl. 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spolini. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1.000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

GOTT BINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 6. apríl kl. 16. 12 plátur 100 kr. Full pláta 300 kr. Drigið verður millum spolini. Høvuðsvinningur á lutaseðli eitt gávukort á 1.000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Burturm. /funnið

FUNNIÐ
Ein Ericsson T39m var funnin aftaná dansin í Miðvági tann 16. mars 2002. Um tú hevur mist hana, so ring
223080

NOKIA 3330
fartelefon burturmist í Vestmanna leygardagin 16. mars. Helst í Losjuni. Telefonin er grá, um nakar hevur funnið hana, er tú vælkomin at ringja á
344454

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt ungt par við einum barnið ið sóknast eftir íbúð í Havn skjótast gjørligt. Vit eru friðarlig, roykja og drekka ikki, og leggja dent á at gjalda til tiðina. Vinarliga ring
253185 ella 257745

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Er tað nakar, sum hevur eina íbúð at leiga/framleiga mær í tíðarskeiðinum 1. mai til 1. desember.
Tlf. 319325 ella 250550

HEY!
Er tað eingin góð sál, sum hevur eina lítla íbúð í Tórshavn til leigu til vinkonu mína og dóttrina? Hon er veruliga í neyð og hevði verið hjartans fegin um tú ringdi. Eg veit, at hon er eitt ordans fólk. Skriva til: Sosialurin, Boks 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 708

SUMMARHÚS YNSKIST
Hevur tú eini summarhús at leiga okkum í 1-2 vikur í summar. Ikki í Føroyum.
Ring (+45) 86.247993, E-mail: dam@mail.djh.dk

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt ungt par við einum barni, ið sóknast eftir íbúð í Havn skjótast gjørligt. Vit eru friðarlig, roykja og drekka ikki, og leggja dent á at gjalda til tiðina.
Tlf. 253185 ella 257745

YNSKIST
Lítil íbúð ella kamar við atgongd til køk og wc ynskist til leigu frá 1. apríl. Drekki ikki.
Tlf. 315958, spyr eftir Hans

KAMAR TIL LEIGU
Kamar til leigu í Hornabø. Hevur egna inngongd, atgongd til køk og bað - til konufólk.
Tlf. 317507

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par søkir íbúð í Klaksvik skjótast gjørligt. Fara væl um og gjalda til tiðina.
Tlf. 252906 ella 260676

SETHÚS/ÍBÚÐ Á EIÐI
ynskjast til leigu skjótast tilber.
422267

LEIGA SAMAN VIÐ OKKUM
Vit eru 3 damur, sum fegnar vilja hava eina afturat okkum at leiga. Vit hava eini hús við 4 kømurum, har atgongd er til alt. Helst ikki undir 25 ár. Hevur hetta tín áhuga, so ring á
260509

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par við lítlari dóttur ynskir íbúð í høvuðsstaðnum. Hava fast arbeiði og fara væl um.
Tlf. 252803

YNSKIST Í KLAKSVÍK
22 ára gamal drongur søkir eftir íbúð ella húsi til leigu í Klaksvík skjótast møguligt.
Tlf. 255737

ÍBÚÐ/KAMAR
ynskist í KBH. Er tað nakar, ið hevur eina íbúð/kamar at framleiga/leiga mær í tíðarskeiðinum 01. mai til 15. nov. Helst undir 3.000 kr.
Barbara 264726/458190

HJÁLP!
Eg eri einsamallur við dóttur mínari, sum er 7 ár gomul, og vit skulu út úr húsunum eg leigi í seinasta lagi 01.07.2002. Hevur tú eina íbúð ella eini hús til okkum?
253096

YNSKIST
Er tað nakar, sum hevur eini hús í miðstaðrøkinum at leiga okkum í mai. Vinarliga ring
0045 25135746

YNSKIST Í TÓRSHAVN
Ungur maður søkir eftir íbúð í Tórshavn skjótast gjørligt.
Tlf. 316490 ella 224817, Jón

YNSKIST Í TÓRSHAVN
Ungur maður søkir eftir íbúð ella stórum kamari skjótast møguligt.
Tlf. 316490 ella 253079, Gisli

SKÁLAVÍK
Nýggjari fríticðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~debes E-postur: debes@post.olivant.fo
Tlf. 311197

Lýsingartekstur

.....

.....

.....

.....

.....

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:

Navn:……..

Bústaður:……

Bygd/býur:……

Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

Bústaðarveiðan

Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðan fyri nevndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til ogn tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – møguliga hava vit rætta keyparan.
Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.

Nr. 912
Stað: Suðurstreymoy
Slag av veiðu: Sethús ella tvíhús
Stødd: Uml. 100 m² (2-3 kømur)
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.300.000,-

Nr. 913
Stað: Sundalagnum
Slag av veiðu: Sethús ella tvíhús
Stødd: Uml. 60 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 500.000,-

Nr. 914
Stað: Streymoynni
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 100-120 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 800.000,-

Nr. 916
Stað: Kvívík ella Skopun
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Ongar treytir
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 600.000,-

Nr. 917
Stað: Sundalagi, Hvalvík/Streymnes
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Ongin treyt
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 1.000.000,-

Nr. 918
Stað: Eysturoy ella Sundalagi,
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Uml. 80-90 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 350.000,-

Nr. 919
Stað: Alt hevur áhuga
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Lítil hús, helst við úthúsi
Ynskir: Skulu standa avsíðis
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 400.000,-

Grundøkir:

Nr. 882
Stað: Norðstreymoy ella Skálafjørðinum
Slag av veiðu: Jørð –Grundøki
Stødd: Uml. 1000-15000 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 200.000,-

Nr. 906
Stað: Tórshavn, Argir ella Hoyvík
Slag av veiðu: Grundøki
Stødd: 500 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 300.000,-

Húsamekling

Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
www.husamekling.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16
Keyp og søla av fastari ogn

Dýr

HVØR VIL EIGA MEG?
Eg eri ein sera fitt tík av seyðahundaslagi. 8 vikur og akti longu. Mínir eigarar mugu av við meg av serligum grundum.
Tlf. 455982 ella 455687

HUNDAHVØLPAR TIL SØLU
Hundahvølpar undan Bordie Collie og Labrador til sølu fyri 500 kr. stk. Eru búnir at lata.
Ring 319000

DVØRGAKANINIR
Vit eru 5 kaninungar. Vit eru 9 1/2 vikur gamlir og vit eru 2 hannar og 3 honir. Er hetta nakað fyri reg, so ring
Tlf. 211324 Rannvá

HUNDAHVØLPUR
9 vikur gamlir hundahvølpar kunnu fáast. Duga at eta og leppa. Bert til djóravin.
Tlf. 444031

KANINIR BURTUR
Fýra kaninir burturblivnar leygardagin 23. mars í Havn. Veit nakar nakað um tær, vinarliga ring
311861ella 254631 Bjørg

KETTA
Ein sera fitt ketta verður latin djóravini vegna serligar umstøður - hon er 9 mánaðar gomul.
255279

YNSKIST
Er tað nakar í Havn, sum hevur eitt lítið hundaslag at selja mær. (Eri góð við djór).
255290

HARRY POTTER
hevur fingið kettlingar. Ein er svartur, ein er trýlittur og ein er svartur við hvítum snýði og labbum. Vinarliga ringi
317810

KETTLINGUR(LØÐA)
Tann 01. januar fekk okkara ketta ein kettling. Hann er nú klárur til eitt nýtt heim. Ring eftir kl. 18 og hoyr nærri.
310994

EFTIRLÝSING
Grá og hvít ketta horvin fríggjakvøldið í Perskonugøtu. Er sera spøk. Hevur nakar sæð hana.
423040/261039

KETTA BURTURBLIVIN
Hevur nakar sæð mína fittu kettu? Hon er horvin av Flat í Hoyvík og finnur helst ikki heim aftur. Kettan er grá, og hevur hvíta bringu og hvít bein. Um onkur hevur borið eyga við hana, so vinarliga ring til mín
Barbara tlf. 261664 ella 316864

HUNDAHVØLPAR
Tveir hundahvølpar undan sera friðaligari tík, verða latnir til djóravin/ir. Ein tík og ein hundur.
Tlf. 316195

Fundir

AÐALFUNDUR
FÁ3. Útsetti aðalfundurin verður hósdagin 18. apríl kl. 16.00 í hølum SFF´s í Lucas Debesargøtu
Nevndin

FOSTURFORELDRAFELAGIÐ
hevur aðalfund á Sjómansheiminum í Tórshavn leygardagin 6. apríl kl. 09.30. Skrá sambært lógum felagsins.
Nevndin

ÁRSAÐALFUNDUR/
HUGNAKVØLD verður í Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum 10. apríl kl. 19.00. Skrá samb. lóg felagsins. Eftir aðalfundin verður fyrilestur og tónleikur.
Felagið Blóðgevi

ÁRSAÐALFUNDUR
verður í Glæmuni 14. apríl 2002 kl. 17.00. Eykaaðalfundur verður aftaná.
K.S.R.

Húsarhaldstól

KOMFÝRUR
Er tað nakar, ið kann selja okkum ein komfýr fyri max 1.500 kr. Skal vera í góðum standi.
318024 eftir kl. 16.00

Innbúgv

ANTIKK TIL SØLU
Rokokko-stólar, kolkassi úr messingi, spegl úr mahogni, samovar, koparketil, kaffistell úr silvuri, rammur, petroleumslampa o.a.
Tlf. 448271

JENSEN BOXMADRASSA
við yvirmadrassum og beinum, 140x200 cm. til sølu fyri 1.000 kr., ella í býti við sovisofu.
Tlf. 372800

FLOTT DUPULTSONG
1 ára gomul, hvit pigmentera, 180x200 v/ madrassum selist vegna ov lítið pláss.
Tlf. 320325

YNSKIST
Hornasofa ella sofasett og lítið sofaborð ynskist til keyps.
Tlf. 312365 eftir kl. 18.00

TIL SØLU
Song 140x200, 3 mans sofa, 2 stólar og sofaborð bíliga til sølu.
312537

TIL SØLU
Sofaborð úr glasi, 140x90, til sølu vegna plásstrot fyri 500 kr.
Tlf. 316016

YNSKIST
Er tað nakar, ið hevur eitt vitrineskáp, eina toyklædda sofu og eitt lítið køksborð, bíliga til sølu.
313074/253062

KLÆDNASKÁP TIL SØLU
150 cm breitt. Miðhurðin er spegl.
310215

TIL SØLU
Nýtt grátt seingjateppi, 140 breitt, 2 pútur hoyra til, til sølu.
310215

TIL SØLU
Spegl og kommoda til gongd, sofasett, sofaborð, hvitt, runt borð v/ plátu og dupult sovisofa til sølu.
314538

Lutaseðlar

STØKK
Hesi nr. hava vunnið: 1: 2012, 2: 2354, 3: 2065, 4: 1930, 5: 1967, 6: 2357, 7: 2289, 8: 2498, 9: 2399. Vinningarnir fáast við at ringja á tlf 441791. Takk fyri stuðulin.
Fimleikafelagið Støkk

LIONS CLUB EYSTUROY
Vinnarin av málninginum í samb. við atgongumerki til málningaframsýningina á páskum var nr. 584. Aðrir vinnarar vóru nr. 21604 (er avheintað), 21878 (er avheintað), nr. 21930 (er avheintað), nr. 21706 (er avheintað), nr. 22752 (er avheintað), nr. 22731 (er avheintað), nr. 22516 er ikki avheintað. Lions Club Eysturoy takkar fyri góða undirtoku. Vinningarnir fáast við at ringja tlf. 444696 (Harley).
Lions Club Eysturoy

5.B Í ARGJA SKÚLA
Mánadagin 25. mars dró Notarius Publicus hesi nummur: 1. vinningur: Gávukort á 4.000 kr. frá Radiohandlinum hjá Persson og Persson, seðil nr. 2473 – 2. vinningur: Gávukort á 2.000 kr. frá Mariu Poulsen, seðil nr. 2420 – 3. vinningur: Gávukort á 500 kr. frá Balslev, seðil nr. 2154 – 4. vinningur: Gávukort á 500 kr. frá Statoil, seðil nr. 2499 – 5. vinningur: Gávukort á 500 kr. frá FK, seðil nr. 2443. Vinnararnir kunnu ringja telefon 283 955. Vinningar, ið ikki eru heintaðir í seinasta lagi 30. apríl fella aftur til flokkin. Takk fyri stuðulin,
5.b í Argja skúla

Pløgg

FØROYSK KLÆÐIR
Skjúrt og troyggja til føroyska búnan ynskist til keyps til gentu, stødd 6-8 ár.
373196

YNSKIST
Føroyskur búni til mannfólk, stødd L, ynskist til keyps.
221195

Samband

SAMBAND YNSKIST
Eg eri ein íslendskur maður, síðst í 30-unum, búsettur á Suðurjútlandi í Danmark. Eg eri einsamallur og kundi hugsa mær at komið í samband við føroyska kvinnu í passandi aldri. Kanska blívur tað til meira enn vinskap. Hevur hetta áhuga, so ring
Tlf. 0045 21627228 Ási

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður á Svangaskarði mánakvøldið kl. 18.30.
B68

SJAVSKAPPING
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið 4. apríl kl. 18.30.
L.Í.F.

Súklur

TIL SØLU
Dreingjasúkkla 4-7 ár. Myrkagrøn Juventus 16" 1 gearfótbremsu. Kr. 300.
Tlf. 315741

BRÚKT KNALLERT
Prutl ynskist til keyps fyri umleið 3.000 kr. Hevur tú áhuga ring á
Tlf. 372275 ella 260797

YNSKIST
Dreingjasúkkla 18-20" við fótbremsu ynskist
Tlf. 315758

TIL SØLU
Sera vælhildin reyð DBS dreingjasúkkla til sølu fyri 1.200 kr. Nýprísur 3.000 kr.
314791

SCOOTARI
til sølu. Hann er uml. 1 1/2 ár og av slagnum SYM. Í góðum standi. Áhugaði kunnu ringja
223333

STÓR DREINGJASÚKKLA
Stór dreingjasúkkla av slagnum Kildemose til sølu fyri 1.000 kr.
314066/260302 aftaná kl. 18.00

YNSKIST
Hevur nakar eina brúkta Suzuki Samurai DM 50 at selja mær?
Tlf. 373308, e. kl. 18, spyr eftir Suna

TIL SØLU
Stórur Choppari til sølu. Ein Suzuki Intrude 1400 til sølu. Er sum nýggjur og í góðum standi. Áhuga ringi til
212422

SUZUKI GSF 400
árg. 93, við skaða, til sølu.
Tlf. 260989 (Runavík)

Teldur

SKRIVSTOVUTELDA
Pentium 150 MHz, 49 MB RAM, 2 GB, 56K modem, CD-R/RW brennari, 15" skerm, Logitech mús - vælegnað til tekstviðgerð, bókhald og internet, til sølu fyri 3.700 kr.
Tlf. 372800

TIL SØLU
Liteon Cd-Brennari Cd-RW, 24X Write/ 10Xm Re-Write/40X CD-ROM, Burn Proof, við nero 5, til sølu fyri kr. 1500.
Tlf. 313471

YNSKIST
Er nakar, ið kann lata mær eitt kabinett, ella selja tað bíliga?
Tlf. 313471

FARTELDA
Fujitsu Lifebook fartelda til sølu. Intel Pendium II, 333 MHz, 3,2 GB, 96 MB ram, Windows 98, modem 56, netkort, microsoft office pakkan, McAffee Viruscan, cd-rom & diskettudrev. Taska fylgir við. Lítið og onki brúkt. 2 1/2 ára gomul.
Tlf. 310890

PLAYSTATION 2 SPÆL
Resident evil X CODE: Veronica til PlayStation 2 til sølu fyri 450 kr. Spælið er óbrúkt.
Tlf. 212726

TELDUBORÐ TIL SØLU
Stórt telduborð til sølu fyri 600 kr.
314066/260302 aftaná kl. 18.00

YNSKIST
Eg eri ein smádrongur, sum ynski mær nøkur fitt og friðarlig playstationspøl bíliga til keyps.
319364/227604

FIFA 2002
til PC »nýtt« til sølu fyri 300 kr. Spælið er ongantíð brúkt.
Tlf. 448220

TIL SØLU
AMD-K6 550 MHz, 17" skerm, 6,4 GB HD, 64 MB Grafikkort, 458 MB cd-rom, ISDN modem, brennari 8 x 4 x 32x, scannari, netkort + alt tað vanliga. Prísuppskot: 7500 kr.
Tlf. 253950

GER KVETTIÐ
Spildurnýggj telda til sølu. 1000 mhz Amd Duron, Miditower kabinet 300w, ECS k7sem botnkort, 128 MB RAM, pc-133 ram. Maxtor 40 gb, skroll mús, Delta 48x cdrom drev, bracket 56k v.90 modem, acer tastatur, 32-64MB onboard 3d grafik, AC'97 onboard ljóð. Teldan er óbrúkt, selist uttan skerm. Prísuppskot 5.900 kr.
Tlf. 317376

Tónleikur

STEREOANLEGG
Gott surround stereoanlegg við hátalarum og DVD-avspælara til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 372800

TIL SØLU
2 Sony forsterkarar 4x200W og 2x100W, Sony Subwoofari 450W, Pioneer equilizer, leidningur fylgir við.
Tlf. 311830/211830

TIL KEYPS
Eg sóknist eftir einum lítið brúktum plátuspælara - helst eisini við 78 snúningum.
Tlf. 361004

STEREOANLEGG TIL SØLU
Pioner PD5300 diskspælari, Pioner SX335 radio, Pioner GR470 equalizari, NAD 5120 plátuspælari, Alpage AL80 bandupptakari og tveir Pioner CS775 hátalarar. Kostnaður 7.500 kr.
Tlf. 318228

TROMPET TIL SØLU
Lítið brúkt og í sera góðum standi.
Tlf. 373054 ella 263012

Út- & Sjónvarp

TIL SØLU
Sony video-upptakari, 8 pro. CCD-V200E. Nýprísur uml. 20.000 til sølu fyri 7.500.
251158

TIL SØLU
1 sett JBL LX80 hátalarar til sølu. 1 1/2 ára gamlir og ljóða sera væl.
Tlf. 211532 eftir kl. 18

Ymiskt

MOTOROLA 3688 TIL SØLU
Lítið brúkt mobiltelefon bíliga til sølu - einans kr. 1.700,-. Ring
Tlf. 250327

TRAPPA TIL SØLU
Brúkt kjallaratrappa, hædd 2,65 m, breidd 0,86 m, longd 2,85 m.
Tlf. 310716 - 210716

RAMPURULLISKOYTUR
»USD-Team-Psirius«, std. 44 1/2, lítið brúktar, ABEC3-kúlulegur. Nýprísur 2.699 kr. Til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 316807

MÁLNINGUR TIL SØLU
Kúrberg málningur eftir Sigmund Petersen frá 1963, (uml. 65 cm X 45 cm), til sølu um hóskandi boð fæst.
Ringið 310480

BASARUR Í KVÍVÍK
Lutir til basarin kunnu latast inn í Glæmuni 29. apríl kl. 19-21.
Nevndin

TIL SØLU
2 stk. dupultir radiatorar á 120 x 60 cm. Síggja gott út. Prísuppskot 250 kr. stk.
Tlf. 317376

TIL SALG
2 el/olieradiatorer, 3 væg el-radiatorer, 1 el-varmtvandsbeholdere. Henvendelse
421719/222134

JØRÐ TIL SØLU
Jorð í Gøtudali til sølu um hóskandi boð fæst. Stykkið er uml. 12.000 fermetrar.
441548 og 211648

VIKUSKIFTISFERÐ
fyri tvey til Islands við Atlantic Airways við uppihaldi – íroknað morgunmat – bíliga til sølu. Skal nýtast innan 17. juli 2002.
Tlf. 372043